# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Vælkomnir íslendingar!

Sunnudagin tann 1. apríl lat Ísland upp aðalkonsulát í Fútastovu í Tórshavn. Hendingin varð markerað við einum hátíðarhaldi í Norðurlandahúsinum, har røður vórðu hildnar. Upplatingin av aðalkonsulatinum er enn eitt prógv um, at Føroyar av álvara eru komnar upp í altjóðaagerðina. Løgmaður vísti í røðu síni á, at Føroyar ivaleyst teljast millum tey einamest avbyrgdu londini í Evropa. Vit eru ikki við í ES, vit eru ikki við í EFTA, vit eru ikki við í EBS, og vit eru ikki fullgildugur limur í Norðurlandaráðnum. Hetta er ein støða, sum vit eiga at gera nakað við. Avbyrgin er vegurin til stagnasjón og afturgongd, meðan samstarv er vegurin til vøkstur og framburð. Hann nevndi í hesum sambandi Hoyvíkssáttmálan sum eitt skilagott stig á vegnum. Hesin sáttmáli er okkara fyrsta veruliga formliga stig út í altjóðaagerðina. Fyrstu stigini eru neyðug fyri at taka tey næstu, tí eisini vit vilja sleppa víðari.

Víðari gjørdi løgmaður vart við, at vit føroyingar hava ta fatan, at tað liggur meira í samstarvinum millum Ísland og Føroya enn áhugamál, sjálvt um vit innast inni vita, at áhugamálini hava alstóran týdning. Vit hava langar og drúgvar tradisjónir fyri samstarvi á so nógvum økjum, tó serliga innan fiskivinnuna. Sum løgmaður vísti á, er tað ikki sørt, at ávísir føroyingar hava hug at óttast framsókna íslendska íløguhugin. Vit hoyra dag og dagliga, at íslendingar keypa danskar og bretskar fyritøkur, og vit síggja somu ábendingar her á landi. Ein íslendskur íløguhugur, sum ivaleyst fær trongskygdar sálir at piprast. Nakað er um hetta, men tað ber heldur ikki til at balla seg inn í sjálvsatfinningar. Heldur eiga vit at brynja okkum og menna okkum til tær avbjóðingar, sum koma við altjóðaagerðini.

Millum Ísland og Føroya eru aldargomul sterk søgulig, búskaparlig og mentanarlig bond. Aðalkonsulatið er ein sterk undirstrikan av, at vit nú eru í ferð við at styrkja hesi bond. Hetta kann bert vera gott. Íslendingar eru fremstir í øllum heiminum at troyta nýggju møguleikarnar í altjóðaagerðini. Teir vóru fyrstir á vøllinum, og vit kunnu læra nógv av teimum. Kanska kunnu teir eisini læra nakað av okkum. Fyrsta og fremsta fortreytin fyri klára seg í altjóðaagerðini er samstarv. Vit mugu fara út, vera har, ið tað fyrigongur. Vit mugu fáa okkara ungdóm út og vit mugu upplæra okkara ungdóm til at liva og virka í einum altjóðagjørdum heimi. Hetta merkir, at ein lykilin til framtíðina ikki bert liggur í meria samstarvi men í eini nútímasgerð av okkara avoldaðu útbúgvingarskipan. Samantikið er íslendska aðalkonsulatið ein varði í altjóðaagerðini – hjartaliga vælkomnir íslendingar!

**Sosialurin**

## Somu rættindi til øll arbeiðsfólk



**INGEBORG VINTHER**
forkvinna, Vegna Føroya Arbeiðarafelag

Føroya Arbeiðarafelag fegnast um, at tveir menn eru dømdir í drúgva og skelkandi málinum um teilendingarnar.

Føroya Arbeiðarafelag royndi í síni tíð at samskifta við teilendingarnir, men tey tordu ikki at tosa við fakfelagið av ótta fyri, hvat kundi henda. Málið bleiv tikið upp við myndugleikar og at enda meldað til løgregluna.

Føroya Arbeiðarafelag heitir á landsstýrismannin við innlendismálum at tryggjað, at útlendsk arbeiðsmegi verður innlimað í fakfelag. Fakfelagið kann fylgja við, at útlendingar, ið arbeiða í Føroyum, fáa tað løn, yvirtíð og annað tey skulu hava sambært sáttmálanum.

Tíverri má Føroya Arbeiðarafelag staðfesta, at málið um teilendingarnir ikki er tað einasta av slíkum slagi.

Útlendsk arbeiðsfólk eru løtt offur, tí tey ikki altíð eru greið yvir síni rættindi. Hetta má broytast, tí áttu árbeiðsgevarar, fakfeløg og avvarðandi myndugleikar í felag at evna kunnandi tilfar á fleiri málum, sum útlendingar skilja.

Føroya Arbeiðarafelag vil gera alt tað er ment fyri at fólk, sum koma hendavegin at arbeiða fáa góðar sømdir.

Dómurin í Føroya rætti verður vónandi ein áminning til øll um, at slík handfaring av fólki fer ikki fram órevsað.

## Betri samband við Svínoynna



**JÓGVAN VIÐ KELDU**
løgtingsmaður

**Sum eg nevndi í míni røðu á løgtingi, er Svínoyggin ein av útoyggjunum, sum er áhugaverd og við so mongum møguleikum fyri at yvirliva.**

Eg má siga, at eg harmist um, eftir at hava lisið greinina hjá Bjarna Jacobsen – ikki bara einaferð - at hann skýrir áhugan hjá mær fyri betri sambandi við Svínoynna at vera lunkaðan.

Hetta minnir meg ikki sørt um blaðskrivingarnar og misnøgdina, sum vóru á meg, tá eg legði rygg til eitt nú Norðoyatunnilin, at fremja byrgingina um Haraldssund, og økið í Klaksvík uppi í Klingrugarði, sum ídag er til gleði og gagns fyri alt landið.

Eg vísti á ymisku møguleikarnar, men fylgdi samstundis øllum hesum málum upp og var fegin um, tá avtornaði og ódnarveðrið hevði lagt seg, vórðu málini framd.

Tað er nú nakað síðani, at landsstýrismaðurin Bjarni Djurholm og eg tosaðu um Svínoynna, har hann greiddi mær frá ymisku kanningunum, sum gjørdar vórðu í samband við havnarviðurskiftini á Svínoynni og í sambandi við Svínoynna. Vit vórðu samdir um at tosa saman aftur, tá kanningarnar vóru klárar. Tað skuldi júst vera um hesa tíðina - altso nú fyrsta dagin.

**Tættari samstarv**

Øll sum kenna Bjarna Jacobsen vita, at hann er roknaður sum skilamaður og ikki minst, tá um Svínoynna og uttan um Svínoynna ræður, har hann er barnføddur. Hinvegin havi eg verið so mikið leingi í politikki, at eg veit, hvar sterku kreftirnar í veruleikanum liggja, og at neyðugt er við tøttum samstarvi við tær, tá nakað skal fremjast, og at neyðugt er at liggja á málinum.

Er tað rætt, at LV-stovnurin í trý ár hevur arbeitt við kanningum av havnarumstøðum á Svínoynni, uttan at hava tosa við myndugleikar har og staðkend fólk, sum hava áralangar royndir í umhvørvinum, so er tað ótrúliga langt úti.

Tann partapolitiska partin fari eg í hesum umfari at lata liggja, eg kann eisini seinni koma til fyrispurning eg hevði viðvíkjandi Svínoynni, tá fíggjarlógin fyri 2007 var fyri, men fari at gera Bjarna í Svínoy og øllum svínoyingum greitt, at umráðandi er við tøttum samstarvi við tann politiska partin, sum situr við ræðið og við teknisku vitanina, sum av politiska systeminum er sett til at fremja landsins útbyggingar, og lat meg til seinast leggja dentin á, at eg skal fylgja málinum upp!

Tí sum nevnt í míni røðu á løgtingi, so er Svínoyggin áhugaverd við so mongum møguleikum og ein av útoyggjunum, sum hevur møguleikar fyri at yvirliva.

## Bingjupláss í sjálvum hjartanum í Sunda kommunu!



**SÓLGERÐ ANDREASSEN**

Nei, nú veit eg ikki longur, um eg skal gráta ella flenna. Siti í Spanien og lesi tíðindi um, at Sunda kommuna skal gera bingjupláss við Streymin.

Eg havi áður víst á lívið og ríkidømið, vit eiga við sjóvarmálan við Streymin. Hví ikki gera campingpláss har? Tað verður ringt at finna betri stað. Byggið eitt lítið savn við plantum og dýrum, sum finnast í umhvørvinum. Savnið gamlar lutir, sum fólk liggja inni við, og sýnið list frá lokalfólki. Setið kikarar upp, so fólk kunnu eygleiða fugl, og latið tey sleppa at fiska uttan fyri dyrnar.

Á, teir møguleikar, og so eitt bingjupláss. Nei, nú stendur verðin ikki longur. Flytið lortin úr fólkaeygum, t.d. norður á íðnaðarøkið hinumegin, og mennið møguleikarnar hjá ferðafólki, sum koma fram við júst hasum økinum. Tað er har, fólk steðga á, tá ið tey finna útav, at einki campingpláss er tøkt.

Tann, ið oyrur hevur, hann hoyri, segði el Señor.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Eyðhild Jacobsen eydhild@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.